VIÐMERKINGAR

# Orðaskifti upp undir fólkaatkvøðuna

*Tíðindaskriv frá »Hesuferð«*

Hesuferð skipar næsta vikuskifti fyri almennum fyrilestrum í fimleikarhøllini á Háskúlanum.

Endamálið er at fáa orðaskifti um týðandi spurningar í samband við komandi fólkaatkvøðuna um fólkarættarligu støðu Føroya.

Øll eru vælkomin og serligar innbjóðingar eru sendar til allar flokkar á tingi og fjølmiðlarnar.

Eftir hvørja framløga er orðið frítt. Skráin sæst niðanfyri.

At fóta sær í einum broytiligum heimi Almennir fyrilestrar á Føroya Háskúla, leygardagin 3. febr. 2001 kl. 14-18.

Inngangur: Ein broytiligur heimur

Framløgur:

1. Tjóðskaparhugsjónin Carl Johan Jensen, rithøvundur
2. Krøv til búskapin/Studningsbúskapurin og avleiðingar Herman Oskarsson, búskaparfrøðingur
3. Krøv til politisku og umsitingarligu skipanina Heini Joensen, næstformaður, Starvsmannafelagið
4. Stýrisskipan, virkisføri og búskapur hjá smáum oyggjalondum í einum broytiligum heimi Kjartan Hoydal, skrivari

15. sending

## Pizza

**Pizzadeiggj:**

*Hetta skalt tú brúka:*

2,5 dl. av vatni
1 tsk. av salti
350 gr. av mjøli
1 pk. av geri
0,5 dl. av olju

1. Rør vatn, salt, ger og olju saman og koyr mjølið í
2. Lat deiggið hvíla ein tíma, áðrenn tað verður rullað út.

**Tomatsós:**

*Hetta skalt tú brúka:*

1 dós av flustum tomatum
1 hvítleyksbát
2 hakkaðar leykir
oregano og basilikum
olivenolju

*Soleiðis gert tú:*

1. Svitsa leyk og hvítleyk í oljuni
2. Stoyt flustu tomatirnar í og lat kóka í 10-15 min.
3. Kroyst sósina gjøgnum eitt sáld og koyr oregano og basilikum í eftir tørvi.

# Den nordiske svanesang

**Hans Jensen**
*Hvalvík*

Fem hvide uskyldsrene, naive svaner skal nu gøres til syv eller helst flere. Symbolet på nordisk enighed eller tåbelighed? Ved festlige lejligheder haler vi de dekorative svaner frem, taler om broderskab, sammenhold og nordisk identitet.

Delegation efter delegation flyver luftrummet tyndt over Skandinavien til nogle velfortjente, afstressende og uforpligtende fridage. Herregud man skal jo bare fyre en højtravende, idealistisk tale af uden bund i virkeligheden. Det er venstrehåndsarbejde for enhver politisk skuespiller.

De smukke og selvoptagne svaner er desværre omgivet af rovfugle uden sans for æstetik. Deres griske øjne ser kun kød – og endda lettilgængeligt kød. Enhver jæger ved, at hvis man skyder ind i en flok er sandsynligheden for at ramme betydelig større, en hvis målet var et enkelt dyr.

Så mens de smukke svaner pusler med fjerene og spejler sig i egen selvtilstrækkelighed, bliver de stille og rolig ædt op af mindre sofistikerede arter, der til gengæld har viljen til at overleve.

Alt imens vi med ildhu diskuterer ligegyldige forskelligheder, forsvinder vi fra landkortet.

Færøerne er det nordiske syndrom i miniformat. Godt nok er vi alle i familie, – men dem på Suderø, på den anden side af sundet eller for den sags skyld dem på den anden side af åen, – er godt nok for underlige til at vi kan samarbejde. Stod det til os – folket – havde vi ikke 50 men mindst 200 kommuner.

Men som de naive nordiske svaner er vi bygdefolk omgivet af rovdyr. Det største har sit jagtområde i den sydlige ende af Strømøen. Det sidder stille og roligt og slikker sig om munden og betragter stoisk den legendariske bygdesplid for så diskret at æde en bygd eller to i et ubevogtet øjeblik.

Når Færøerne så er blevet en kommune – og helst, hvis det står til Landsstyret endnu en gumpetung svane i den virkelighedsfjerne nordiske flok, vil vi, som de andre nordiske lande, forsvinde fra landkortet.

Måske er vor indre splid historisk. Uden en belejring af Paris, blev halvdelen af en vikingehær tørstig og vendte om for at hente mere vin. Da vi kom tilbage var den tilbageblevne del af hæren naturligvis slagtet af franskmændene.

Nordisk enighed når den er bedst.

# Fólkaatkvøðan, ið hvarv

**Súsanna Dam**



Sitandi løgting og landsstýri fóru til verka við stórum orðum og føgrum lyftum um at vinna hesi undirkúgaðu tjóð sítt sjálvsagda fullveldi á øllum økjum – evsta vald og evstu ábyrgd. Vælvalt orðaskvaldur, ið fekk tey ófrælsu at rætta ryggin og síggja ljósið.

Restin – vit, sum ikki kenna okkum serliga trælkað – hava síðandi tá og ikki sørt undrandi skoðað framferðarháttin. Tragikomikkur í reinasta líki.

Samráðingar eita tey ófrávíkiligu krøvini, sum sett eru dønum. Úrslit higartil hava einans verið stórir lestrar við nógvari eymkan um, hvussu vánaliga viðferð teir fáa, og so samkenslufjarrit úr øllum ættum, ið ætlandi skulu hjálpa teimum ivandi til at taka støðu fyri okkara røsku men óheppnu fyriskiparum.

Hetta er tann parturin av fullveldinum, sum teir siga, at danir skylda okkum.

Hin parturin – krøvini til føroysku tjóðina – eru at vísa seg ikki stór, ikki enn í hvussu so er. Vit skulu bara gera, sum vit altíð hava gjørt. Nevnliga lata sum um, alt er í lagi, tiga og samtykkja, til alt er avgjørt, og vit ikki fáa vent.

Eingin avgerð uttan at fólkið hevur talað, varð lovað, og nú tá dagurin fyri fólkaatkvøðuni nærkast ljóðar, at vit kanska skulu svara fýra spurningum við einum svari. Altso bara um so er, at teir ráðandi semjast um, hvat vit skulu spyrjast um. Semjast teir ikki so fara teir kanska at halda áfram at samráðast við danir. Eingin veit um hvat, men eru tað somu ófrávíkiligu krøvini sum áður, so er komikkurin vissuliga fullkomin. Taktikkurin at vera so grovur og kravmikil, sum teir hava verið mótvegis hinum partinum í ríkisfelagsskapinum, skapar einki uttan ein púra óneyðugan illvilja, sum ongantíð kann koma okkum til góðar, uttan mun til hvønn møguleikan, vit einaferð fara at velja.

Teir hava fyri langari tíð síðani rent seg fastar í samráðingunum við danir, og innanhýsis megna teir ikki at semjast um, hvat teir sjálvir vilja. Snøgt sagt, tað sær ikki út til, at teir duga, og duga teir heldur ikki enn at síggja, at soleiðis er tað, ja so er eisini tragedian fullkomin.



# KRIS í Føroyum boðar frá

**Hans Eiler Hammer**
*Formaður*

Felagsskapurin fyri tey kynsliga misnýttu, ið ber heitið KRIS í Føroyum, vil við hesum boða frá, at frá mánadegnum 22. januar hava vit opna telefonlinju hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 45 81 81. Linjan verður opin frá kl. 20.00-22.00. Her eru øll tey, sum á ein ella annan hátt eru kynsliga misnýtt, vælkomin at venda sær fyri at fáa ráðgeving og hjálp.

Vit vilja eisini boða frá, at frá mikudegnum 24. januar koma vit at veita einstaklinga ráðgeving eftir avtalu. Ein kann avtala viðtalutíð á tlf. 45 81 81 hvørt mánakvøld og hóskvøld frá kl. 20.00-22.00.

Ein og hvør er eisini vælkomin at venda sær beinleiðis til felagið á adressu:

KRIS í Føroyum
Boks 345
700 Klaksvík



VIÐMERKINGAR

# Stutt hugleiðing um málburðin í tíðindasendingum



**Asbjørn Lómaklett**

*Tøkk til Bjørt Samuelsen, útvarpskvinnu!*

Í seinastuni hevur Bjørt, ið eg annars als ikki kenni, lisið upp í tíðindasendingum útvarpsins, og er tað fragd at hoyra hana lesa, og her verður ikki bert hugsað um ta reinu røddina, men meira um, at hon hevur virðing fyri føroysku málløruni, lesur allar endingar beint, »ur«-endingar hjá sterktbendum sagnorðum, 2. - og 3. pers. nútíð og »ir«-endingarnar, tá hesar skulu vera hjá veikt bendum sagnorðum í 2. og 3. pers. nútíð, sigur »u«- og »i«-endingar, sum tær eiga, og »artikulerar«, ber orðini fram í heilum líki o.s.fr. Tað er at harmast um, at hetta er rættiliga sjáldsamt at hoyra hjá ungum fólki í dag, tíverri.

Hon nýtir føroyskt framtungu »r« í endingum, ið hóskar væl til føroyska málið og ikki amerikanska/enska »r«-ið, sum javnan er at hoyra í dag, tá yngri fólk tala. Her hugsi eg um tað ljóðið, ið er í amerikanska fólkanavninum »Al Gore« til dømis.

**So løgið, tað enn ljóðar, eru tað næstan bert suðringar, ið »tora« at siga eitt hampuligt føroyskt »r« í endanum á orðunum, so tað veruliga hoyrist.**

### Jarðleggja mállæruna

Annars er tað at siga, at meira enn ein av nýggju upplesarunum í tíðindasendingunum ikki tykjast at geva sær far um, at tey eru við til at jarðleggja meginpartin av føroysku mállæruni eirindaleyst:

Allar »ur«-endingar verða strikaðar til frama fyri »ir«-endingina í øllum upplestri. Tað er at vóna, at hetta ikki er við vilja.

Allar »i«- og »u«-endingar verða lisnar sum eitt dovisligt »e«, t.d.: /Tíðindé úr Tórshavnar kommuné), (av kommunéskrivstovéné), (leingjé), (tíggjé), (ikké) o.s.fr. Hetta er annars tað, ið er hent við skandinavisku málunum, at u/i-endingar eru dotnar niður á eitt »é«. Einastu norðurlendsku málini, ið enn hava varðveitt gomlu endingarnar, eru føroyskt og íslendskt.

Í dag skuldi ikki verið neyðugt hjá okkum at farið sama vegin sum hini málini, av tí at vit hava jú skriftmálið dagliga at stuðla okkum afturat.

Hvat skulu vit læra børnini mállæru til, tá okkara máttmiklasti málsligi stovnur virðir so lítið um bendingarlæruna?

### Bygda- og býarmálini sín rætt, sjálvan

Sjálvandi skulu bygdamálini hava sítt rætt, men eg haldi ikki, at nakað málføri kann yva sær at fara so illa við sjálvari mállæruni og orðaendingunum, tá lisið verður upp í almennari tænastu. Hitt við ymiskari úttalu er eitt heilt annað mál og í lagi. Her verður hugsað um »ei«/»oy« – mer/mær – á/a o.s.fr.

Tá mállæran verður traðkað so undir fót sum í hesum føri, má hetta kallast **málslig »degeneratión« ella rein málspilla og einki annað.**

Ilt at skilja hetta – tað mátti verið meira málsligur stoltleiki í fólki enn so, at nakar vil hava eitt mál, ið als ongar reglur skal hava at ganga eftir, men bara sleppa at fara í órøkt við **»alt er nóg gott«-hugburðinum sum grundgeving?**

### Táttur/tættir – Innslag/innsløg

Fyrr nýtti útvarpið snøggu føroysku orðini »táttur/tættir« um tær einstøku sendingarnar í einari skrá. Sama gjørdu teir við einstøku smálutirnar í stakari sending. Hetta var alt gjørt í fluttari merking, men sera væl riggaði.

Nú er vent í holuni. Síðani nýggj fjølmiðlafólk eru komin framat í bæði ÚF og SvF, eru føroysku orðini býtt um við fremmanda heitið »indslag«, ið nær um **onga meining hevur á føroyskum**. Hetta er ringt býti, eru tað mong, ið halda.

**Løgið, at næstan øll fjølmiðlafólkini skulu vera samd um slíkt!**

Ein kann so spyrja, hvør saklig orsøk, ið liggur aftanfyri avgerðina, men truplult er at hugsa sær til, hví eitt sovorðið stig er tikið, tá vit í føroyskum hava so snøgt orð sum »táttur« til nýtslu.

# Sektin á hvat annar fær, eg skal nøra at mær!

**Arne Jensen**
*Skúgvi*

So hvørt sum okkara vegakervi og ferjuflutningur eru útbygd, røkka oljufeløgini, við teirra stóru bilum, fleir og fleiri av okkara íbúgvum.

Hesar fyritøkur hava avgjørt at levera olju til øll, ið kunnu røkkast við bilunum, fyri sama prís, óansæð um tú býr í Hornabø, á Trøllanesi, í Bø ella við Gjógv.

Ein og hvør veit, at kostnaðurin pr. litur av olju, ið verður leveraður, er ikki tann sami alla staðni, sjálvt um oljan fæst fyri sama prís.

Tey fólk, ið ikki sleppa undir hesa »sosialu« skipan, eru eftirhondini ikki 200 tandur, ið búgva á okkara óhøgligastu oyggjum.

Roynt varð leingi og væl at fáa hesa skipan at galda eisini fyri okkum, men til fánýtis. Hóast góðan vilja, var hetta ov kostnaðarmikið fyri hesi gullrandaðu feløg.

Hesin trupulleikin varð tíbetur loystur, tá útoyggjastudningurin kom teimum til hjálpar.

Nú hava tvey onnur feløg eisini funnið útav, at tey hava rætt til útoyggjastudning, heilar 2 mill. í sín part.

Hetta eru feløg, ið fáa stórar upphæddir úr landskassanum til politiska upplýsing. Annað teirra sigur seg ikki brúka hana; hon verður tó brúkt so ella so.

At tit á Dimmu og Sosialinum ikki skammast av at taka við hesum asosiala framferðarhátti, ið oljufeløgini hava lært tykkum, tað gongur yvir mítt forstand.

Eg vil tó siga, at eg kann væl liva uttan vikuskiftisbløðini, tað er so mangt annað, ið er meira uttanhanda enn tað, men út frá hesum síggja vit hógvarnar og vita harvið hvar vit hava tykkum.

Suðuroyggin og Sandoyggin fáa enn olju og bløð uttan útoyggjastudning, men hvussu leingi hetta varar er ikki gott at vita.

Klókast er at taka slík stig í smáum, tá merkist tað minst og so kann tað nýtast sum fordømi, tá annað stig skal takast.

Føroyingar styðja ta hugsan, at standalondini eiga tað ríkidømi, ið liggur úti fyri teirra strondum, sum eisini er rætt.

Strendurnar, ið horva út móti ríkidøminum hjá okkum, eru tær hjá útjaðaranum.

Um Suðuroyggin fekk tann rætt, ið strandalond hava, eftir okkara meining, hevði hon fingið oljuna og sínar ríku fiskigrunnar fyri seg sjálva, og kundi tá sloppið frá at staðið við hattinum í hondini og biddað molar frá teimum, ið nú hava buktina og báðar endarnar.

# Framtaksgrunnurin!

**Svenning Borg**
*Vági*

Nú ljóðar frá Framtaksgrunninum, at teir skulu selja 10% av partabrøvunum í Føroya Fiskavirking. Grundgevingin er tann, at F.F. nú koyrir so væl, gevur yvirskot, at nú kann seljast av fyritøkuni, og ætla teir so at selja 10% av partabrøvunum í fyritøkuni.

Hetta er skeiv áskoðan, ið Framtaksgrunnurin hevur. Eftir tí eg minnist, tá ið Framtaksgrunnurin bleiv stovnsettur, skuldu flakavirkini seljast út úr Fiskavirking, tá ið tey kundu bera seg fíggjarliga, og F.F. skuldi ikki vera til meira.

Við at selja 10% nú og so 10% nakrar ferðir til seinni, ger bara, at monopol-líknandi støðan hjá Føroya Fiskavirking heldur fram. Hví skal ikki anti trust lógin ráða í flakavirkisvinnuni, tá ið hon skal ráða í alivinnuni, at onki felag ella einstaklingur skal eiga meira enn 20% av flakavirkisvinnuni í Føroyum.

Tað fyrsta, sum framtaksgrunnurin skal selja, tað er flakavirkið í Vági. Tað er einasta virkið, ið stendur eftir, sum onki virksemi er á. Øll hini virkini, sum vóru í loysnini hjá Framtaksgrunninum, er virksemi á ella eru seld. Hví verður virkið í Vági ikki selt, tá ið keypari er til tað?

Málið má vera, at flakavirkini verða seld út úr Føroya Fiskavirking eitt og eitt og at Føroya Fiskavirking verður søga.

# Viðmerkingar til lógaruppskotið um Barnsburðargrunn

**Carita Björklund**
*Formaður í Føroya Pedagogfelag*



Vit kunnu fegnast um, at hetta lógaruppskot er komið, har eisini pápin fær møguleika at fáa farloyvi við løn.

Tó kunnu vit harmast um, at lógaruppskotið leggur upp til, at pápin kann yvirtaka 10 vikur frá mammuni, tvs., at um pápin skal fáa hesi rættindi, skal mamman skerjast við teimum 10 vikunum.

Hevði lóggávan ístaðin latið pápanum 10 vikur umframt, so hevði lógin verið ein bati ístaðin fyri ein vansi fyri kvinnuna.

Hetta er ein sera álvarslig skerjing av longu vunnum rættindum hjá kvinnuni – ikki minst við atlitið til bróstabarni.

Hóast lógaruppskotið tosar um løntakarin – mann og kvinnu – skulu vit í umrøðuni av lógaruppskotinum ikki gloyma, at taka barnið við.

Annars kann Føroya Pedagogfelag taka fult undir við grein hjá Finni Helmsdal, løgtingsmanni í Dimmalætting 25. januar 2001, har hann heldur, at hetta skuldi verið skylda arbeiðsgevarans at gjalda 0,5% í barnsburðargrunnin – tá hevði arbeiðsgevarin í størri mun svara sínum skyldum og løntakarin fingið staðfest longu vunnin rættindi.